


# SKIPSASSISTENTUR (DEKKARI) TIL NORRÖNU

Smyril Line søkir eftir skipsassistenti til Norrönu. Vit bjóða honum/henni eitt spennandi starv umborð á flaggskipinum í føroysku ferðavinnuni. Starvið er avbjóðandi og fjølbroytt, og tú fært ein góðan møguleika at verða við í framhaldandi menningini av Norrönu og Smyril Line – og harvið føroysku ferðavinnuni.

Aftrat góðum starvstreytum bjóða vit hartil eina áhugaverda siglingarætlan, góða løn og góða frítíðaravtalu.

**Førleikakrøv til skipsassistent:**
- Arbeiða sjálvstøðugt
- Vera ágrýtin og røkin
- Góð samstarvsevni

**Arbeiðsuppgávur er t.d.:**
- Alt vanligt skips- og viðlíkahaldsarbeiði
- Lossa og lasta trailarar og annan farm
- Vaktarhald á brúnni

**Setanartreytir**
Setanartreytir sambært sáttmála millum Føroya Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**SMYRIL LINE**
Financial Controller
M/F Norröna
P.O Box 370
FO-110 Tórshavn

Umsøknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 13. desembur 2007.

Nærmari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til financial controller á:
+298 34 49 92 ella
controller@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Noreg, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO ·

WWW.SMYRIL-LINE.FO





## Fleischer´s Hotel

Bygt í 1889. Gistingarhús kent fyri sítt høga tænastustøði.

Sjálvt um Fleischer's er eitt elligamalt gistingarhús, so er tað við tíðini blivið hildið við líka, somuleiðis sum tað til dagin í dag hevur hildið sín gamla stíl. Øll kømurini hava wc/bað, TV og minibarr. Eisini hevur hotellið matstovu og pianobarr. Í náttklubbanum er dansur fimm ferðir um vikuna.

Eisini hevur hotellið svimjihyl, sauna, jacuzzi, billiard og borðtennis.

# SKÍÐFERÐ VOSS – »VESTNORGES ALPER«

Her eru skíðbakkar til ein og hvønn tørv. Voss hevur tað man kallar »snegaranti« frá 1. januar til 1. apríl. Um náttúran ikki er før fyri at levera tann kavan, ið skal til, so verða kavakanónirnar settar til.

Voss liggur sera náttúruvakurt fyri ímillum Hardangerfjørðin og Sognefjørðin. Hetta ger at býurin er nógv vitjaður alt árið.

Til barnafamiljurnar hevur Voss eitt frálíkt barnaøkið, kallað »Badnakroken«. Her eru professionellir aktivitetsleiðarar, skíðlift og møguleiki er eisini fyri at lána sleður, spakar v.m til børnini at hugna sær við í kavanum.

Kundi man hugsað sær at sett skíðirnar frá sær eina løtu, so eru yvir 100 handlar, og fleiri matstovur og vertshús hvar ein kann fáa tíðina at ganga.

## Dømi 1

2 vaksin + bilur. Umborð verður gist í útvendigum 2-koyggjukamari.

Koyrt verður beinleiðis til Voss (uml. 1½ tíma), har gist verður í dupultkamari á Fleischer's Hotel. Eftir at hava fingið morgunmat leygarmorgun er møguleiki at standa á skíð og »shoppa« allan dagin.

Um kvøldið gongur leiðin so aftur til Bergen, hvar kekkað verður inn á Thon Hotel Bergen Brygge, hvar somuleiðis verður gist í dupultkamari.

**Kr. 3.868,-**

Kostnaðurin er uttan leigu av skíðútgerð
www.visitvoss.com/skiutleige.html

## Dømi 2

Sami túrur sum í dømi 1, tó ein ferðandi uttan bil í deildum 4-koyggjukamari. Einakømur á gistingarhúsunum.

Hetta kann lata seg gera við at ferðast til Voss og aftur við toki.

**Kr. 2.076,-**

Kostnaðurin er uttan leigu av skíðútgerð.
www.visitvoss.com/skiutleige.html





NOREG · ÍSLAND
HETLAND · DANMARK
CRUISE

WWW.SMYRIL-LINE.FO
TLF 34 59 00